**Fólkaflokkurin**
**Tjóðveldi**
**Miðflokkurin**
**Sambandsflokkurin**
**Sjálvstýrisflokkurin**
**Javnaðarflokkurin**

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 38/2009: Uppskot til samtyktar um at skerja føroyska útlátið av veðurlagsgassum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið tekur undir við,

**at** Føroyar fyrireika seg til sjónliga at skerja útlátið av veðurlagsgassum, sum væntandi verður samtykt við nýggju veðurlagsavtaluni á COP15-fundinum í desember, og

**at** føroyska útlátið av veðurlagsgassum verður skert við í minsta lagi 20 % í tíðarskeiðinum 2010-2020 í mun til útlátið í 2005.

Samstundis heitir Løgtingið á landsstýrið um at taka stig til at fyrireika uppskot til neyðugar lógarkarmar fyri at fremja Løgtingsins samtykt.

Eisini heitir Løgtingið á landsstýrismannin í veðurlagsmálum um annaðhvørt ár, fyrstu ferð í tingsetuni 2011-12, at lata Løgtinginum eina støðufrágreiðing um, hvussu gongst við at røkka málinum at skerja útlátið av veðurlagsgassum. Frágreiðingin eigur at viðgera spurningin og møguleikarnar at seta enn hægri innlendis mál at skerja útlátið av veðurlagsgassum.

**Viðmerkingar:**

## 1. Ein nýggj altjóða avtala um at skerja útlátið av veðurlagsgassum

Føroyar standa í dag við eitt vegamót á veðurlagsøkinum. Ein løgtingssamtykt við breiðari undirtøku úr øllum flokkum er eitt týðuligt tekin til okkara fólk og umheimin um, at Føroyar hava sett eina miðvísa kós á veðurlagsøkinum, hvørs aðalmál er at ganga burtur frá fossilum brennievnum sum orkukeldu og í staðin nøkta orkutørvin við alsamt størri brúk av varandi orkukeldum.

Gongst eftir ætlan, verður roknað við, at ein nýggj og løgfrøðiliga bindandi altjóða veðurlagsavtala verður samtykt á COP15-fundinum í Keypmannahavn í desember 2009, sum ásetur eitt felags ella fleiri ymisk mál um at skerja útlátið av veðurlagsgassum í tíðarskeiðinum 1. januar 2013 og nøkur ár fram, helst fram til ár 2017 ella 2020.

Kyotoprotokollin er eitt fordømi um eina bindandi altjóða avtalu, sum tó bara áleggur bindingar á umleið 40 lond, um at skerja útlátið av veðurlagsgassum, og hon gongur sum kunnugt út við ársenda í 2012, og ein avloysari skal tí samtykkjast á COP15-fundinum í Keypmannahavn.

Í løtuni er tað ongin, sum við vissu veit at siga, hvat ítøkiliga úrslitið verður av altjóða samráðingunum, hvørki í mun til bindingar um niðurskurð, tíðarskeiðið, ið bindingin verður galdandi fyri, ella hvørjar mekanismur annars vera í avtaluni. Í skrivandi stund liggja 5 ymisk uppskot til eina nýggja avtalu á samráðingarborðinum; talan er um góðar 200 síður av tekstuppskotum, og tað er úr hesum teksti, at nýggja avtalan, ella avgerðin um at skerja útlátið av veðurlagsgassum, skal verða funnin.

Meginreglan, sum nýggja veðurlagsavtalan fer at byggja á, er ásett í grein 3, stk. 1 í Veðurlags-sáttmálanum (United Nations Framework Convention on Climate Change / UNFCCC):

"The Parties should protect the climate system for the benefit of present and future generations of humankind, on the basis of equity and in accordance with their common but differentiated responsibilities and respective capabilities. Accordingly, the developed country Parties should take the lead in combating climate change and the adverse effects thereof."

Umsett til føroyskt er meginreglan nakað soljóðandi:
"Partarnir eiga at verja veðurlagsskipanina til frama fyri verandi og komandi ættarlið, grundað á rættvísi og í samsvari við teirra felags, men ymisku ábyrgd og eftir hvør sínum førimuni. Tessvegna eiga Partarnir í mentu londunum at ganga á odda í stríðnum móti veðurlagsbroytingum og óynsktu avleiðingunum."

Lyklaorðini í altjóða samráðingunum eru "í samsvari við teirra felags men ymisku ábyrgd og eftir hvør sínum førimuni."

Breitt politiskt ynski er um, at Føroyar sjónliga taka undir við nýggju altjóða avtaluni um at skerja útlátið av veðurlagsgassum. Sjónliggeringin verður mett at hava stóran týdning fyri Føroyar. Fyri tað fyrsta er tað eitt tekin um, at Føroyar ynskja at vísa umheiminum, at vit átaka okkum altjóða ábyrgd at skerja útlátið av veðurlagsgassum, og fyri tað næsta, at Føroyar binda seg til ein niðurskurð á altjóða stigi, sum ikki stendur aftan fyri bindingar, sum onnur lond eru sinnað til. Ein sjónlig binding, sum vit megna at fremja í verki, verður mett at hava positivar avleiðingar fyri Føroyar og føroysk áhugamál.

Akkurát hvussu, tað kann sjónliggerast, at Føroyar gerast partur av nýggju veðurlagsavtaluni, er ikki greitt enn, men nakrir møguleikar verða umrøddir við danskar myndugleikar:

- at Føroyar skriva undir nýggju avtaluna saman við Danmark og møguliga Grønlandi,
- at danir í ratifikasjónini til ST skrivliga boða frá, at Føroyar eisini taka undir við avtaluni,
- at Føroyar verða settar í eitt yvirlit yvir lond, sum binda seg til ávísan niðurskurð,
- ella onnur loysn.

## 2. At seta framsøkin og realistisk mál um at skerja útlátið av veðurlagsgassum

Fólkaflokkurin, Tjóðveldi, Miðflokkurin, Sambandsflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin ynskja, at Løgtingið tekur undir við, at Føroyar seta framsøkin og realistisk mál at skerja útlátið av veðurlagsgassum, ið er ájavnt altjóða málum um minking.
Flokkarnir taka undir við, at málið um at skerja føroyska útlátið av veðurlagsgassum skal byggja á hesi politisku stevnumið:

"Føroyar ásanna, at útlátið av veðurlagsgassum er ein stór avbjóðing fyri okkara vælferðarsamfelag og onnur samfeløg í heiminum.

Føroyar viðurkenna, at stríðið móti veðurlagsbroytingum, ið stava frá mannaelvdum virksemi, er ein heimsumfatandi avbjóðing og uppgáva.

Føroyar binda seg til at seta framsøkið og realistiskt mál at minka útlátið av veðurlagsgassum frá verandi virksemi, sum er ájavnt altjóða máli um minking.

Føroyar staðfesta, at møguleikarnir fyri at menna eina framtíðar oljuvinnu ikki verða skerdir.

Føroyar leggja áherðslu á, at ein miðvís gongd burtur frá fossilum brennievni styrkir okkara búskap og vinnu. Ein skynsamur umhvørvispolitikkur er til frama fyri okkara útflutning og okkara heimligu ferðavinnu.

Føroyar vilja fíggjarliga stuðla og skunda undir menning, royndir og uppsetan av alternativum orkuskipanum, ið byggja á varandi orkukeldur, sum kunnu gagnnýtast heima ella úti í heimi."

Ítøkiliga verður skotið upp at skerja útlátið av veðurlagsgassum við í minsta lagi 20 % í tíðarskeiðinum 2010-2020 í mun til útlátið í 2005.

Flokkarnir vilja ikki avskriva møguleikan fyri, at niðurskurðurin í tíðarskeiðinum 2010-2020 kann verða hægri enn 20 %. Tí verður skotið upp, at orðingin um prosentvísa málið verður "í minsta lagi" 20 %. Við hesi orðing er skilligt eitt niðaramark sett fyri málinum um minking, og samstundis verður tað gjørt sjónligt, at strembast skal eftir einum hægri niðurskurði.

Samanborið við onnur lond, sum hava játtað seg sinnað til eina ávísa skerjing av veðurlagsgassum undan COP15-fundinum í Keypmannahavn, er føroyska málið um í minsta lagi 20 % skerjing eins framsøkið og nógv mál, sum onnur lond hava sett sær fyri, heruppií ES-lond. Víst verður til talvu 1 og talvu 2, sum er hjálagt uppskotinum.

## 3. Arbeiðsgongdin higartil

Landsstýrið hevur í meira enn eitt ár fyriskipað ymiskt arbeiði, hvørs endamál var at fyrireika Føroyar at gerast partur av einari nýggjari altjóða veðurlagsavtalu. Undanfarna landsstýri heitti á landsstýriskvinnuna í innlendismálum um at seta ein arbeiðsbólk at gera eitt hugskotsyvirlit yvir møgulig tiltøk, sum setast kunnu í verk at minka um útlátið av veðurlagsgassum. Úrslitið var frágreiðingin "*Skjótt syftir seiðir – og tað tunga takið*" frá desember 2008.

Tíðliga í ár heitti landsstýriskvinnan í innlendismálum á løgmann og landsstýrisfólkini um at koma við uppskotum um, hvørji tiltøk kunnu setast í verk innan teirra málsøki fyri at skerja útlátið av veðurlagsgassum. Hesi uppskot vóru løgd fram og umrødd á einum evnisdegi hjá landsstýrinum 2. juni í ár. Ein niðurstøða frá evnisdegnum var, at landsstýriskvinnan skuldi seta ein skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk við umboðum fyri vinnuna og tað almenna at koma við tilmæli um "ambitiøs men realistisk mál" ella framsøkin og veruleikakend mál at skerja útlátið av veðurlagsgassum. Úrslitið av hesum arbeiðinum er frágreiðingin "Uppskot til veðurlagspolitikk Føroya" frá tvørgangandi veðurlagsbólkinum.

Tvørgangandi veðurlagsbólkurin mælti til ein niðurskurð á 20 % í tíðarskeiðinum 2010-2020 í mun til útlátið í 2005. Í tvørgangandi veðurlagsbólkinum sótu umboð úr Vinnuhúsinum, SEV, Reiðarafelagnum, Fíggjarmálaráðnum, Fiskimálaráðnum og Innlendismálaráðnum. Tvørgangandi bólkurin hevur, tá frágreiðingin varð handað landsstýriskvinnuni, víst á, at arbeiðshátturin í bólkinum var soleiðis, at fyrst varð kannað, hvat læt seg gera at fremja í verki í tíðarskeiðinum 2010-2020, og síðani varð lagt saman, hvussu stóra skerjing tiltøkini vóru mett at geva í útlátinum av veðurlagsgassum. Úrslitið av hesum greiningar- og metingararbeiði var, at til ber at røkka 20 % skerjing í 2020 við "at seta fá, men týðandi og miðvís tiltøk í verk á økjum, har góðir møguleikar eru fyri at minka útlátið."

Tvørgangandi bólkurin hevur eisini víst á, at "gongdin verður tvørlig og ikki nóg miðvís, jú fleiri hættir verða valdir, m.a. tí at tað politiskt og fyrisitingarliga gerst ov tungt at tryggja, at tiltøkini verða sett í verk vísandi til rúgvismikla fyrireikandi arbeiði innan lógarsmíð, uppsetan av skipanum, at broyta politikk, mannagongdir og umsiting."

Landsstýriskvinnan í innlendismálum hevur, eftir at frágreiðingin frá tvørgangandi bólkinum varð handað, ráðført seg við ávikavist politiska og ráðførandi fylgibólkin í veðurlagsmálum, sum løgmaður hevur samskipað. Hetta fyri at slóða fyri eini breiðari politiskari semju um veðurlagsmálið, sum eisini er rótfest í tí hugsan og áhugamálum, sum týðandi almennir og privatir stovnar og felagsskapir standa fyri. Hetta verður mett týðandi, serliga tí at málið um at røkka í minsta lagi 20 % skerjing kemur at røkka yvir eitt 10 ára tíðarskeið.

Í vár samtykti Løgtingið eitt uppskot til samtyktar, sbr. løgtingsmál 134/2008, um at seta ferð á menningina av varandi orkukeldum. Breið undirtøka var fyri uppskotinum, og ongin atkvøddi ímóti.

**4) Hættir at røkka málinum um í minsta lagi 20 % skerjing**

Flokkarnir taka undir við, at til ber at skerja útlátið av veðurlagsgassum við í minsta lagi 20 % í tíðarskeiðinum 2010-2020 í mun til útlátið í 2005, við at seta miðvís tiltøk í verk innan hesi átaksøki:

I. Upphiting
II. Elframleiðslu
III. Ferðslu á landi
IV. Skip og flogfør
V. Varandi orkukeldur
VI. Upplýsing og kunning

Flokkarnir eru samdir um, at veðurlagsøkið og veðurlagspolitikkur fevnir um væl meira enn eittans málsøki hjá tí landsstýrismanni, sum situr við veðurlagsmálum, hetta tí at átaksøkini og tiltøkini, sum sett verða í verk, fevna um málsøki hjá fleiri landsstýrisfólkum. Atlit eiga tí at verða tikin at veðurlagspolitikkinum, tá annar politikkur verður orðaður í framtíðini, tað veri seg ein undirvísingarpolitikkur, ein búskaparpolitikkur, ein ferðslupolitikkur, ein vinnupolitikkur, o.s.fr.

Fleiri av londunum, sum hava meldað út støddina á sínum niðurskurði, hava eisini rokkið politiskar semjur um, hvussu niðurskurðurin skal fremjast í verki. Talan er í flestu førum um langtíðarætlanir, sum røkka fram til 2020 og longur. Hetta gera londini m.a. fyri mótvegis umheiminum at sjónliggera, at politiskur vilji er handan orðini og játtaðu bindingina um at skerja útlátið av veðurlagsgassum og fyri at tryggja politiska kjølfesti um ætlanina í heimlandinum.

Landsstýriskvinnan í veðurlagsmálum hevur evnað til Veðurlagspolitikk Føroya, sum serliga byggir á uppskotið til veðurlagspolitikk frá tvørgangandi veðurlagsbólkinum umframt uppskot til tiltøk frá ávikavist politiska og ráðførandi fylgibólkinum. Veðurlagspolitikkur Føroya er hjálagdur sum skjal 1 til hetta uppskot. Veðurlagspolitikkurin ger greitt, hvørji tiltøk sitandi landsstýrið vil seta í verk fyri at røkka málinum um at skerja útlátið av veðurlagsgassum við í minsta lagi 20 %.

Mett verður, at hjálagda uppskot til ein føroyskan veðurlagspolitikk er eitt skikkað uppskot til, hvussu eitt stórt umskifti kann verða gjørt í samfelagnum frá at brúka nógv fossil brennievni og til at brúka minni og annars at nøkta orkutørvin við meira varandi orku. Við teimum fáu, men miðvísu tiltøkum, sum har eru skotin upp, ber til at skerja útlátið av veðurlagsgassum við í minsta lagi 20 % í mun til útlátið í 2005. Flokkarnir viðurkenna, at fleiri hættir eru at røkka málinum um at skerja útlátið av veðurlagsgssum, enn júst teir hættir, ið skotnir eru upp í veðurlagspolitikkinum. Fyri landsstýrið er avbjóðingin at vísa á eitt bland av tiltøkum, sum verða sett saman, og sum samanlagt eru nóg mikið til at røkka yvirskipaða málinum um at minka útlátið við einum ávísum prosenttali.

Umráðandi er at hava í huga, at tilgongdin at skerja føroyska útlátið av veðurlagsgassum steðgar ikki 1. januar 2020, men hon byrjar 1. januar 2010. Hetta arbeiðið fer at halda áfram í nógv ár frameftir, og tí er tað umráðandi, at vit í Føroyum finna eitt felags stev á veðurlagsøkinum.

Flokkarnir meta, at ein semjusøkjandi loysn er at rætta sjóneykuna móti teimum økjum, sum breið undirtøka er fyri, og at lata smidleika ráða á økjum, har undirtøkan ikki er eintýðug. Orsøkin til hetta er m.a., at ein breið semja um niðurskurðin og ein breið undirtøku fyri høvuðslutunum í langtíðarætlanini um at røkka málinum er avgerandi fyri, at borgarin, vinnan og samfelagið yvirhøvur kunnu hava álit á, at málið um at skerja útlátið veruliga verður rokkið innan ásettu tíð. Ikki at røkka málinum um niðurskurð til ásettu tíð kann fáa stórar negativar avleiðingar fyri áhugamál Føroya.

**5) Støðufrágreiðing til Løgtingið**

At enda í uppskotinum til samtyktar verður skotið upp, at landsstýrismaðurin í veðurlagsmálum annaðhvørt ár leggur frágreiðing fyri Løgtingið um veðurlagsmál. Endamálið við hesum er at geva øllum flokkum ein møguleika at fylgja við í, hvussu gongst at røkka setta málinum, at geva flokkunum høvi til at bera síni sjónarmið fram um førda politikkin umframt at koma við uppskotum til, hvussu politikkurin kann tillagast broyttar umstøður í samfelagnum, nýggjari tøkni o.s.fr.

Hjálagt hesum uppskoti til samtyktar er Løgtinginum til kunnleika:
Skjal 1: Veðurlagspolitikkur Føroya
Skjal 2: Uppskot til veðurlagspolitikk Føroya – frá tvørgangandi veðurlagsbólkinum
Skjal 3: Veðurlagssáttmálin, sum Løgtingið samtykti at seta í gildi fyri Føroyar 2. desember 1993 (United Nations Framework Convention on Climate Change)
Skjal 4: Viðmerkingar frá Tjóðveldi
Skjal 5: Viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni
Skjal 6: Viðmerkingar frá Føroya Lærarafelag
Skjal 7: Viðmerkingar frá Boga Hansen, Havstovuni
Skjal 8: Viðmerkingar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Skjal 9: Viðmerkingar frá Føroya Kommunufelag
Skjal 10: Viðmerkingar frá Samtak
Skjal 11: Viðmerkingar frá Kommunusamskipan Føroya
Skjal 12: Viðmerkingar frá Granskingarráðnum

**Í Tórshavn, tann 19. oktober 2009**

| | | |
|---|---|---|
| **Fólkaflokkurin**<br>Anfinn Kallsberg<br>____________ | **Tjóðveldi**<br>Bjørt Samuelsen<br>____________ | **Miðflokkurin**<br>Bill Justinussen<br>____________ |
| **Sambandsflokkurin**<br>Alfred Olsen<br>____________ | **Sjálvstýrisflokkurin**<br>Kári P. Højgaard<br>____________ | **Javnaðarflokkurin**<br>John Johannessen<br>____________ |

## TALVA 1: Skerjingar hjá ES-londunum

Kelda: European Comission

| | GHG emission target 2008-12 relative to 1990 (%) | GHG emission target by 2020 relative to 2005 (%) | GHG emission cap in 2020 for non-ETS (MtCO2e) |
|---|---|---|---|
| Belgium | -7.5 | -15 | 70.95 |
| Bulgaria | -8 | +20 | 35.16 |
| Czech Republic | -8 | +9 | 68.74 |
| Denmark | -21 | -20 | 29.87 |
| Germany | -21 | -14 | 438.92 |
| Estonia | -8 | +11 | 8.89 |
| Ireland | +13 | -20 | 37.92 |
| Spain | +15 | -10 | 64.05 |
| Greece | +25 | -4 | 219.09 |
| France | 0 | -14 | 354.45 |
| Italy | -6.5 | -13 | 305.32 |
| Cyprus | n/a | -5 | 4.63 |
| Latvia | -8 | +17 | 9.37 |
| Lithuania | -8 | +15 | 18.43 |
| Luxembourg | -28 | -20 | 8.52 |
| Hungary | -6 | +10 | 58.02 |
| Malta | n/a | +5 | 1.53 |
| Netherlands | -6 | -16 | 107.30 |
| Austria | -13 | -16 | 49.84 |
| Poland | -6 | +14 | 216.59 |
| Portugal | +27 | +1 | 48.42 |
| Romania | -8 | +19 | 98.48 |
| Slovenia | -8 | +4 | 12.14 |
| Slovakia | -8 | +13 | 23.55 |
| Finland | 0 | -16 | 29.74 |
| Sweden | +4 | -17 | 37.27 |
| UK | -12.5 | -16 | 310.39 |

**TALVA 2: Útmeldingar um skerjing frá einstøkum øðrum Annex 1 londum**

Kelda: UFCCC/KP/AWG/2009/10/Add. 4/Rev.1

| Party | Information relating to possible QELROs | | Inclusion of LULUCF | Status |
|---|---|---|---|---|
| | Range or single value by 2020, percentage | Reference year | | |
| Australia | -5% up to – 15% or -25% | 2000 | Y | Officially announced |
| Belarus | -5% to – 10%[1] | 1990 | TBD | Officially announced |
| Canada | -20% | 2006 | TBD | Officially announced |
| European Union | -20% to 30% | 1990 | N for – 20 Y for – 30% | Adopted legislation |
| Iceland | -15% | 1990 | Y | Officially announced |
| Japan | -15%[2] | 2005 | N | Officially announced |
| Liechtenstein | 20% to – 30% | 1990 | N | Officially announced |
| Monaco | -20% | 1990 | -- | Officially announced |
| New Zealand | -10% to -20% | 1990 | Y | Officially announced |
| Norway | -30% | 1990 | Y[3] | Officially announced |
| Russian Federation | -10% to – 15% | 1990 | TBD | Officially announced |
| Switzerland | -20% to – 30% | 1990 | Y | Consultations in progress |
| Ukraine | -20% | 1990 | TBD | Under consideration |

[1] Conditional to access to flexible mechanism
[2] This target is based on pure domestic reduction efforts. How to treat credit offset and sinks will be considered during the course of the negotiations
[3] LULUCF is included in the light of present rules. If the rules are changed Norway's national goal will be changed accordingly

- **QELRO** – Quantifed Emission Limitation or Reduction Objective
- **Y** =Yes / **N** = No /**TBD** = To be determined